| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**24. juni 2004** | Blað nr.:<br>**5911**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **24. juni 2004**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **74/04-99/04**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Jan Christiansen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jákup Suni Joensen
Høgni Mikkelsen
**Bjarti Mohr**
Schumann Hjaltalin
Sjúrður Olsen
Beate L. Samuelsen
Tórfinn Smith
Elin Lindenskov
Hildur Eyðunsdóttir
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Jan Christiansen

Annfinn Brekkstein fyri Kirkjubøar kommunu
Jógvan Thomsen fyri Nólsoyar kommunu

**LUTTÓK IKKI:**
Eyðfinnur Lenvig fyri Hest kommunu

**LUTTÓK EISINI:**
Jens M. Poulsen
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**83/04** **200400038**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 24. juni 2004:** Tikið til eftirtektar.

**84/04** **200301310**

**Gøtunavn til útstykkingina hjá S. H. Smíð við Løgmannabreyt.**

**Gøtunavnanevndin 24. mai 2004:** Nevndin skjýtur upp, at vegurin fær navnið:

*Kirkjustræti*

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla býráðnum, um mentamálanevndina, til at gøtan fær navnið

*Kirkjustræti*

**Mentamálanevndin 3. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**85/04** **200400613**

**Broyting av byggisamtykt fyri Kollafjørð**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ætlanin í j. nr. 200202500 "Uppskot um framtíðar byggisamtykt fyri Kollafjørð" verður samtykt sum ein framtíðarætlan fyri Kollafjørð, er hetta nýggja málið um broyting av byggisamtykt fyri Kollafjørð stovnað.

Umsitingin metir, at tað er neyðugt at broyta partar av byggisamtyktini fyri Kollafjørð beinanvegin, soleiðis at nøkur nýggj byggiøki verða løgd út, og soleiðis at heitini og ásetingarnar fyri tey ymisku økini verða tey somu sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sí kortskjal j.nr. 200400613-5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært kortskjali.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Málið snýr seg um at útvega grundøki til sethúsabygging og øki til miðstaðarbygging.

Nevndin samtykti at taka undir við ætlanini og at beina málið í býráðið.

**Kollfjarðarnevndin 15. mars 2004:** Samtykt at mæla til at taka undir við tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Býráðið 18. mars 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur í skrivi, j. nr. 200302155-1, móttikið viðmerkingar til ætlanir hjá Tórshavnar kommunu um at broyta ásetingarnar fyri økið, ið viðkemur festið Sjóaargarður Niðari partur".

Orsakað av innanhýsis skráseting hevur skrivið ikki verið við í viðgerðini av málinum, og tað er tískil neyðugt, at málið verður lagt fyri nevndina aftur, soleiðis at málið kann viðgerast við støði í øllum fyriliggjandi upplýsingum.

Hjálagt er skriv, j. nr. 200302155-1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært kortskjali j. nr. 200400613-5.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. apríl 2004:** Samtykt at tann parturin, ið skrivið umfatar, j. nr. 200302155-1, skal viðgerast av nýggjum og verður beint í kollfjarðanevndina.

**Kollfjarðarnevndin 1. juni 2004:** Nevndin mælir til at tikið verður undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektium viðvíkjandi byggisamtyktini fyri Kollafjørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**86/04** **200102633**

**Umsókn frá Gudmundi Skæling um at partur av ogn hansara matr. nr. 1121 a, Tórshavn, verður útlagt sum byggiøki**

Ognin, sum er uml. 5.800 m$^2$, liggur í 4. grundumráði, ið er lagt út til landbúnað, alment frílendi og tílíkt.

Ognin markar upp til A2 økið eystureftir og A3 økið suðureftir.

Løgmansskrivstovan og býarskipanarnevndin hava í skrivi, 23. mai 2001, víst á, at "endamálið við býarplaninum er ikki at planleggja eftir tørvinum hjá einstaka borgaranum".

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir frá at ganga umsóknini á møti og boða umsøkjaranum frá, at ein heildarætlan fyri kommununa verður gjørd í løtuni, har øll byggisamtyktin verður endurskoðað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. november 2001:** Nevndin samtykti at mæla frá at ganga umsóknini á møti og at boða umsøkjaranum frá, at ein heildarætlan fyri kommununa verður gjørd í løtuni, har øll byggisamtyktin verður endurskoðað.

**Ískoyti:**
Nú er heildarætlanin fyri Tórshavnar kommunu góðkend av býráðnum.

Størsti parturin (uml.4.400 m$^2$ av teimum 5.800 m$^2$) av økinum, sum søkt verður um at broyta byggisamtyktina fyri, er í heildarætlanini útlagt sum byggiøki.

Í heildarætlanini er hetta øki í ”etapu 2” - 2007-12”.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og broyta byggisamtyktina sambært heildarætlanini fyri Tórshavnar Kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**87/04** **200301602**

**Broyting av byggisamtyktina fyri matr.nr. 43g, Argir, frá B3 vinnuøki til A1- ella A3 bústaðarøki**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Økið, talan er um, er parturin av B3 økinum, á Argjaboða, sum liggur omanfyri vegin. Víddin av ognini er 3460 $m^2$.

Ætlanin er at stykkja økið út til sethús ella alternativ raðhús.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti, við tí at ásetingarnar fyri økið verða A3.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Býráðið 23. oktober 2003:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Skriv er nú komið frá Innlendismálaráðnum við boðum um, at umsóknin um at broyta byggisamtyktina fyri ein part av B3 vinnuøkinum á Argjaboða til A3 bústaðarøki ikki verður gingin á møti.

Grundgevingin, fyri at ætlanin ikki var góðkend, er, at virkisbygningar eru á verandi B3 øki, niðanfyri vegin, og at ætlað bústaðarbygging ikki sampakkar sum næsti granni við verandi og møguliga komandi virksemi á vinnuøkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um víðari skal farast við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at halda fast við býráðssamtyktina og at heita á býráðið um at mótmæla avgerðini hjá býarskipanarnevndini hjá Føroya landsstýri.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**88/04** **200401464**

**Heildarætlan fyri Dr. Jakobsens gøtu/ Sverrisgøtu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til Heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, j. nr. 200101579, har lagt verður upp til, at Tórshavnar kommuna, við einum miðvísum arbeiði at menna miðbýin, ger eina miðbýarætlan, ið loyvir meirbygging í miðbýnum við upp til 25%, hevur umsitingin gjørt uppskot til Heildarætlan fyri Dr. Jakobsens gøtu/ Sverrisgøtu, har meirbygging verður loyvd fyri matriklarnar, ið marka upp til gøturnar báðar.

Ætlanin við hesum er at økja um tættleikan kring tað, ið lagt verður upp til skal koma at verða handilgøta/gongugøta í miðbýnum. Sí kortskjal j. nr. 200401464-1.

Økið, ætlanin fevnir um, skal síggjast sum ein týðandi partur av miðbýarætlanini, har ein nýggj handilsgøta/gongugøta kann koma at virka sum bindingslið millum verandi og komandi miðbýarfunktiónir.

Ein slík gøta fer at verða eitt natúrligt bindingslið millum tvær potentiellar miðbýarlundir við gamla kirkjugarð og verkætlanina um eina miðbýarlund við Tinghúsvegin millum Bøkjarabrekku og Áarvegin, j. nr. 200400607.

Arbeitt hevur verið áður við einari líknandi ætlan, j. nr. 200101692, men bleiv ætlanin tá ikki førd út í verki. Táverandi ætlan bleiv væl móttikin av teimum avvarðandi, men manglandi støðutakan til pakeringstrupulleikar høvdu við sær, at ætlanin var løgd aftur til umsitingina at arbeiða víðari við.

Í dag hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt ávíst arbeiði í at útvega fleiri parkeringspláss kring miðbýin, og er tað tískil uppá sítt pláss at henda ætlanin verður tikin fram aftur, nú vísast kann á fleiri parkeringspláss í nærøkinum. Sí kortskjal j. nr. 200401464-2.

Arbeitt hevur somuleiðis verið við at ávísa ferðslumøguleikar millum gøtuna og hesi parkeringsøkir. Sí kortskjal j. nr. 200401464-3.

Heildarætlanin leggur tó upp til, at beinleiðis krav til bilstøðlar á sjálvum matriklinum hjá teimum, har meirbygging verður loyvd, ikki skal setast, - hetta fyri at ætlanin um eina slíka handilsgøtu/gongugøtu skal kunna fremjast. Víst verður á, at sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu *§ 2. Ásetingar fyri 1. Grundumráði, stk. 6*, verður í heildarætlan fyri avmarkað økið, lagt upp til at slíkt frávik kann gevast.

Heildarætlanin loyvir matriklunum, ið marka upp til Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu, eitt byggistig uppá 0,8 og eitt nettunýtslustig uppá 2,0, og er ætlað at liggja sum 1. grundøkið.

Kjallarahæddin verður ikki tald við í nettonýtslustignum, og verður hon roknað eftir leistinum fyri 1. grundøki annars. Hetta hevur við sær, at ásetingarnar fyri økið skulu broytast fyri tann partin av Dr. Jakobsens gøtu, sum í dag liggja sum A1-øki.

Somuleiðis skal heildarætlanin positivt nevnast í almennu byggisamtyktini sum eitt avmarkað øki, har serligar ásetingar eru galdandi.

Uppskot til broyting av ásetingum, er lýst á kortskjal j. nr. 200401464-4

Heildarætlanin ásetur, at handlar skulu vera í hæddini við atgongd til gøtuna. Hinar hæddirnar kunnu verða til skrivstovur, smærri virki, sum natúrliga hoyra heima í sambandi við eina handilsgøtu/gongugøtu, stovnar og íbúðir.

Modell í 1:200 er gjørt, ið lýsir ætlanina, sum hon kann taka seg út í samspæl við restina av miðbýnum.

Víst verður í modellinum á, hvussu ein slík gøta kann útvega neyðuga tættleikan, samstundis sum hon hevur røttu staðsetingina til at gerast ein dygdargóð handilsgøta/gongugøta í miðbýnum.

Kortskjøl lýsa hvussu staðsetingin við frástøðu til parkeiring, busssamband, torg, stovnar og aðrar handlar, stuðla undir gøtuna. Bústaðartættleikin í innara miðbýi stuðlar somuleiðis undir menningina hjá gøtuni. Sí kortskjøl j. nr. 200401464-2,3,4,5 og 6.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin tekur undir við uppskoti um broyting av ásetingunum fyri økið, víst á kortskjal j. nr. 200401464-4, soleiðis at meðan broytingin verður viðgjørd eftir lógarfestu mannagongd, sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, kann arbeiðast víðari við at gera uppskot til ferðsluviðurskifti, útsjónd og aðrar reglugerðir at leggja fyri nevndina aftur.

Víðari mælir býararkitekturin til, at nevndin tekur undir við at umrødda økið, víst á kortskjal j. nr. 200401464-4, skal positivt nevnast í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu § 2. Ásetingar fyri 1. Grundumráði, sum eitt stk. 8:

"Fyri bygging á ognunum fram við Dr. Jakobsens gøtu, frá gamla kirkjugarðinum, og Sverrisgøtu niðan í Tinghúsvegin, kann byggivaldið geva serloyvi til bygging, sum tað metir hóskandi til at stimbra gøtuna sum handilsgøtu /gongugøtu."

Endaliga mælir býararkitekturin til, treytað av at broytingin av byggisamtyktini verður framd, at nevndin tekur undir við uppskotinum um at gera eina heildarætlan fyri økið, har byggistig og nettonýtslustig verða ávikavist 0,8 og 2,0.

Kravið um útvegan av fleiri parkeringsplássum í sambandi við meirbygging, verður slept, og avroknað sum ásett gjald fyri skipan av parkeringsplássum í nærøkinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. juni 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum um at gera heildarætlan fyri økið og at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini sambært framløgdum kortskjali j. nr. 200401464-4.

Harumframt samtykti nevndin, at niðasta hædd skal verða til útatvenda nýtslu (handil ella matstovur), og at gongubreytirnar skulu verða yvirdekkaðar við markisum ella karnappum.

**Býráðið 24. juni 2004:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Jógvan Arge, um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu: Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Ímóti atkvøddu: Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Tórfinn Smith.

Síðan varð atkvøtt tilmæli frá byggi og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Leivur Hansen.

**89/04** **200400092**

**Býlingshús/dagstovnur á Velbastað**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býlingshúsið/dagstovnurin skal hvør rúma 2 barnagarðsstovum til 18 børn hvør, 1 vøggustovu til 12 børn og 1 høli til frítíðarskúla til 20 børn.

Byggi- og býarskipanardeildin hevur gjørt útbjóðingartilfar, dagfest 27. mai 2004, har arbeiðið verður boðið út sum totalarbeiðstøka í almennari lisitatión.

Á kommunustýrisfundi í Kirkjubø 27. mai 2004 kunnaði Jan Christiansen um útbjóðingartilfar til lisitatión til nýggjan barnagarð á Velbastað.

Kirkjubøar kommuna hevur gjørt viðmerkingar til tilfarið, dagfest 1. juni 2004.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at góðkenna útbjóðingar-tilfarið, dagfest 27. mai 2004, og at viðmerkingarnar frá Kirkjubøar kommunu verða tiknar við í útbjóðingini, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 3. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. juni 2004:** Einmælt samtykt.

**90/04** **200400529**

**Umsókn frá Býlingshúsinum undir Brúnni um fíggjarligan stuðul til at gera spæliplássið meira avbjóðandi**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við "Berjabrekku 3. byggistig", hevur Býlingshúsið undir Brúnni mist ein stóran part av spæliplássinum. Í tí sambandi hevur kommunan bjóðað býlingshúsinum eitt annað stykkið, sum uppskot er gjørt til, hvussu gerast kann eitt mennandi, spennandi og trygt spælipláss.

Byggideildin hevur viðgjørt ætlanina og metir, at spæliplássið fer at kosta kr. 354.000,00 (sí uppskot).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta kr. 354.000,00 av íløgujáttanini 2004, soleiðis at Býlingshúsið undir Brúnni aftur kann fáa eitt spennandi spælipláss til børnini.

**Mentamálanevndin 3. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**91/04** **200003257**

**Uppskot til reglugerð fyri Tjarnargarð.**

## Reglugerð fyri Tjarnargarð

§ 1
*Navn og heimstaður*

Navn stovnsins er Tjarnargarður.

Tjarnargarður er kommunalur stovnur, sum hevur heimstað í Tórshavnar kommunu.

§ 2
*Endamál*

Endamál stovnsins er at geva fólki úr Tórshavnar kommunu, sum hava tørv á røkt alt samdøgrið eitt heim, har tey fáa røkt, og fjálgað verður um tey.

Eisini er endamál stovnsins í dagtímunum at veita umlætting til heimabúgvandi minnisveik.

§ 3
*Leiðsla*

Til tess at røkja dagligu leiðsluna á heiminum, setir kommunan ein leiðara. Heimarøktin og Serforsorgin skal kunnast um setanina. Eftir tilmæli frá leiðaranum setir Tórshavnar kommuna fólk í starv, sum skulu arbeiða á heiminum. Sama mannagongd er galdandi, tá starvsfólk verða søgd úr starvi.

§ 4
*Starvsfólk v.m.*

Fólk, sum verða sett í starv eftir hesi reglugerð, verða lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið/Kommunala arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag.

§ 5
*Upptøka*

Avgerð um upptøku verður tikin av eini upptøkunevnd.

Upptøkunevndin er fyribils sama nevnd, sum upptøkunevndin fyri Tórshavnar Ellis- og umlættingarheim. Harumframt er leiðarin á Tjarnargarði í upptøkunevndini.

§ 6
*Fíggjarætlan og roknskapur*

Stk. 1. Roknskaparárið er álmanakkaárið.

Stk. 2. Tórshavnar kommuna ger ársfíggjarætlan fyri heimið, sum verður send Heimarøktini og Serforsorgini til góðkenningar.

Stk. 3. Tórshavnar kommuna fráboðar mánaðarliga góðkendu fíggjarstøðuna til Heimarøktina og Serforsorgina. Góðkenningin skal fylgja roknskaparreglum landsins um góðkenning av játtanarroknskapi. Mánaðarliga fráboðanin skal fylgja kontoskipan landsins.

Stk. 4. Grannskoðaður ársroknskapur við grannskoðarafrágreiðing verður sendur Heimarøktini og Serforsorgini í seinasta lagi 2 mánaðir eftir árslok.

§ 7
*Eftirlit og ábyrgd*

Tórshavnar kommuna hevur eftirlit og avgerðarrætt á heiminum, tá tað snýr seg um viðurskifti, ið ikki hava við røktina at gera. Heimarøktin hevur eftirlit við røktarviðurskiftunum á heiminum, og hevur fráboðanarskyldu mótvegis Heimarøktini og Serforsorgini.

§ 8
*Góðkenning og broytingar*

Hendan reglugerðin verður at góðkenna av Almanna- og heilsumálaráðnum, sambært § 32 í forsorgarlógini, sum eisini skal góðkenna broytingar í reglugerðini.

Góðkent

Almanna- og heilsumálaráðið Tórshavnar kommuna

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at góðkenna reglugerðina.

**Sosiala nevnd 8. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at taka undir við sosialu nevnd og at mæla býráðnum til at góðkenna reglugerðina.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Nú fór Annfinn Brekkstein.

**92/04** **9900542**

**Ískoyti til reglugerð um vatnveiting í Tórshavnar Kommunu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Av og á kemur umsókn til vatnverkið í sambandi við ynski at fáa eyka brunatrygd í virkis- og handilsbygningar - sonevnda sprinkling.

Skal bygningur hava sprinklaraskipan, eru ávís krøv, ið skulu lúkast, m.a. rørvídd og vatnnøgd, sum skal leggjast inn á bygningsøkið.

Tað er rættiliga ymiskt, hvat kostnaðurin verður, skal hetta ynski gangast á møti. Tað velst um vatnleiðingskervið.

Er hóskandi vatnleiðing í gongubreyt næst við nevnda bygning, verður kostnaðurin at leggja neyðug rør inn á økið á leið kr. 20.000,00. Er neyðugt at grava t.d. 100 metrar fyri at koma til høvuðsvatnleiðing, er kostnaðurin sjálvsagt væl hægri.

Mett verður, at umsøkjarin sjálvur, heldur enn kommunan, rindar fyri hesa útreiðslu, og í hesum sambandi fingið eitt ískoyti í okkara reglugerð um vatnveiting.

§ 7 í reglugerðini er um íbinding í vatnleiðingskervið, og kundi ískoytið ljóðað so:

”Er ynski um serliga brunatrygd, t.d. sprinkling av bygningum v.m., ber umsøkjarin sjálvur kostnaðin av arbeiðinum at knýta í hóskandi høvuðsvatnleiðing.”

Leiðarin á gøtuljós- og vatndeildini kemur at greiða frá.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við nevnda ískoyti og at senda málið um fíggjarnevndina í býráðið til endaliga støðutakan.

**Tekniska nevnd 8. juni 2004:** Meðan málið var til viðgerðar, luttók Viggo Christiansen á fundinum.

Ein meiriluti, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Leivur Hansen og Tórfinn Smith, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 24. juni 2004:** Einmælt samtykt.

**93/04** **200400389**

**Nýtt reinsiverk í Havnardali**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í íløgum fyri fíggjarárið 2004, sum er samtykt av Tórshavnar býráð, er peningur avsettur til byggiprogramm av nýggjum reinsiverki í Havnardali.

Sum kunnugt eru kr. 135.000,00 fluttar av nevndu upphædd fyri at gera forkanningarnar til nýggja vatnbyrging í Kollafirði lidnar, sum er mál nr. 200102548.

Leiðslan á teknisku deild umhugsar at skipa ein internan arbeiðsbólk við Boða Haraldson, Robert Thomassen og Viggo Christiansen, og Árna Jakobsen frá p/f Sofus M. Jakobsen sum skrivara.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at resterandi kr. 365.000,00 verða játtaðar til nevnda endamál.

**Tekniska nevnd 8. juni 2004:** Meðan málið var til viðgerðar, luttók Viggo Christiansen á fundinum.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 365.000,00 til nýtt reinsiverk í Havnardali og at játta peningin av konto fyri nýíløgur.

**Býráðið 24. juni 2004:** Eimælt samtykt.

**94/04** **200401502**

**Viðv. leigusáttmálanum millum Tórshavnar Skipasmiðju og Tórshavnar kommunu og Tórshavnar Havn.**

Í sambandi við at skipasmiðjan hevur avhandað skipasmiðjuvirksemi sítt, er skriv komið frá Advokatfelagnum, dagfest 4. juni 2004, um at avhendingin verður skipað á tann hátt, at p.f. Tórshavnar Skipasmiðja setur á stovn dóttirfelag, sum síðani yvirtekur allar fastar ognir o.a. hjá felagnum, og tá ið hetta er gjørt, yvirtekur Notio Framtaksfelag p.f. partabrøvini frá skipasmiðjuni.

Biðið verður um loyvi at nýggja felagið kann yvirtaka verandi leigusáttmálar fyri lendið.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Leivur Hansen og Schumann Hjaltalin, metir, at rættast er, at Tórshavnar Havn umsitur sáttmálan og beinir málið í havnanevndina til ummælis/viðmerkingar og til gerð av nýggjum sáttmála at leggja fyri fíggjarnevndina og býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, vil lesa og seta seg inn í verandi sáttmála, áðrenn málið verður sent havnanevndini.

**Tilmæli:**
Av tí at málið ikki kann dragast út og tí hetta er sent havnanevndini, sum hevur fund aftur aftaná summarsteðgin, mælir kommunustjórin til, at umsøkjarin fær boð um, at nýggja felagið í prisippinum (í prinsippinum merkir, at virksemið kann halda áfram) kann yvirtaka leigumálið, og at nýggjur leigusáttmáli verður gjødur, har treytir o.a. verður viðgjørt.

**Býráðið 24. juni 2004:** Tikið av skrá.

- nú fór Sjúrður Olsen

**95/04** **200300671**

**Svarskriv frá innlendisdeildini, dagfest 24. mars 2004, uppá klaguna hjá 4 býráðslimum um ymisk viðurskifti í kommununi.**

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Svarskrivið tikið til eftirtektar.

Leivur Hansen krevur málið fyri býráðið.

**Býráðið 24. juni 2004:** Framlagt.

**96/04** **200401111**

**Projektuppskot: Bygningur til endurnýtsluna á Hjalla**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Heilsu- og umhvørvisnevndin samtykti hin 5. februar 2004 at játta kr. 1,0 mió. av íløgum 2004 til gerð av bygningi til móttøku, viðgerð og goymslu av serliga dálkandi burturkasti á endurnýtsluni á Hjalla, sí j. nr. 200400104.

Tørvurin á einum slíkum bygningi er eyðsýndur. Núverandi umstøður til vandamikið burturkast eru ikki nøktandi og liva ikki upp til nútíðar krøv, ið avvarðandi myndugleikar seta til tílíkt virksemi. Nevnast kann, at bæði Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Arbeiðseftirlitið hava átalað umstøðurnar til vandamikið burturkast.

Tekniska fyrisitingin hevur saman við Arkitektavirkinum Magnusi Hansen gjørt projektuppskot til ein bygning, ið hevur hesar funktiónir:

- Móttøka, viðgerð og goymsla av vandamiklum burturkasti.
- Pláss til at avskipa serligt burturkast (vandamikið, elektronikk o.t.).
- Amboðsgoymsla.
- Kundamóttøka/kontrollsentur, har ið skráseting/gjalding fer fram.
- Skrivstovupláss til plássleiðaran.
- Fólkarúm, so sum tekøk, toilett, skiftirúm, baðirúm, reingerðarúm.
- Skrivstovuhøli til fyrisiting (leiðaraskrivstova, trý skrivstovupláss, fundar-/frálæruhøli, toilett og matstova).

Byggingin verður mett at kosta íalt kr. 5,9 mió, alt íroknað, eisini 6,25% mvg. Og kr. 5,4 mió tá innrættingin av ovaru hæddini ikki er við.

Hjálagt er projektuppskot frá Magnusi Hansen, j. nr. 200401111-1, tekningar dagfestar 15. apríl 2004.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til:

at taka undir við projektuppskotinum
at nýta uml. kr. 700.000 av tí sum er framflutt frá íløgunum 2003 (sum játtað varð til liðuggerð av endurnýtsluplássinum) til arbeiðið, soleiðis at tað verða kr. 1,7 mió. tøkar í ár.
at alt verður bjóðað út í senn í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku, uttan innrætting av ovaru hædd til skrivstovuhøli.
at heita á fíggjarnevndina um at játta restina kr. 3,7 mió.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. mai 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum, tó so, at heitt verður á fíggjarnevndina um at taka hædd fyri restkostnaðinum við komandi fíggjarlógarviðgerð.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mál uttan fyri skrá:**

**97/04** 200400336

**Áheitan frá Christiani Djurhuus, dagfest 6. februar 2004, um at serstaka byggisamtyktin fyri Hvítanes verður broytt, her verður serliga hugsað um matr. nr 99a.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Christian Djurhuus sigur í áheitanini, at byggisamtyktin fyri Hvítanes er gomul og ikki nøktar tørvin fyri grundøkjum á Hvítanesi í dag.

Matr. nr. 99a liggur niðri í bygdini, nær við veg og aðrar tekniskar installatiónir. Økið er útlagt sum fríøki í sersøku byggisamtyktini fyri Hvítanes.

Byggisamtyktin fyri Hvítanes er samtykt av Tórshavnar býráð í 1979 og góðkend av Føroya landsstýri í 1982.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstaka byggisamtyktin fyri Hvítanes ikki verður broytt vísandi til, at onnur øki á Hvítanesi eru útløgd til sethúsaøki, sum enn eru óbygd. Hesi øki eru eystan fyri vegin oman til Hvítanes, niðan ímóti Hvítanesvegnum.

**Hvítanesnevndin 28. mai 2004:** Hvítanesnevndin mælir til, at serstaka byggisamtyktin fyri Hvítanes verður endurskoðað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2004:** Samtykt at gera broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Hvítanes, soleiðis, at økið A, miðstaðaøkið, verður broytt til B, sethúsaøkið.

Eisini samtykt at leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**98/04** **200200151**

**Skriv frá p/f I. R. Lastvognar, móttikið 21. desember 2001, har boðað verður frá, at felagið ætlar at byggja á økinum á havnalagnum í Kollafirði.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Felagið spyr eisini, um Tórshavnar havn er áhuga at keypa verandi ognir, soleiðis at teir kunnu byggja á øðrum stað.

Eisini verður spurt um vísast kann á annað høgligt øki at byggja á.

P/f I. R. Lastvognar er eigari av matr. nr. 239 og 238a á havnalagnum í Kollafirði við ábygdum húsum. Felagið hevur eitt gamalt byggiloyvi, og ætla teir at byggja fyrst í komandi ári.

**Havnanevndin 28. desember 2001:** Samtykt at umsitingin tekur upp samráðingar við p/f I. R. Lastvognar viðvíkjandi keypi at leggja fyri nevndina.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við p/f I. R. Lastvognar.

Matr. nr. 239 og 238a eru upp á tilsamans 1.441 $m^2$.

Á øðrum matr. nr. er Hotel Geyti, sum er ein bygningur í 3 hæddum við einum grundøki upp á umleið 120 $m^2$, og á hinum matr. nr. stendur ein bygningur, sum verður brúktur sum smiðja.

Partarnir eru komnir ásamt um, at p/f I. R. Lastvognar lata ognirnar í Kollafirði til Tórshavnar kommunu/Tórshavnar havn í býti við matr. nr. 1oe, sum er eitt umleið 8.400 $m^2$ stórt øki hjá kommununi. Harafturat skal p/f I. R. Lastvognar gjalda 1,7 mió.

Hetta er treytað av góðkenning frá havnarnevndini, fíggjarnevndini og býráðnum.

**Havnanevndin 5. apríl 2002:** Samtykt at taka undir við semjuni og at mæla býráðnum til, at Tórshavnar havn keypir matr. nr. 239 og 238a í Kollafirði fyri kr. 3.241.043,00 sum partur av makaskifti.

**Kollfjarðarnevndin 10. apríl 2002:** Kunnað varð um "makaskiftið" við p.f. I. R. Lastvognar.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2002:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 2. mai 2002:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Handilin við I. R. Lastvognar kom ikki í lag, serliga tí tey hildu at grundøkið á Sandvíkahjalla var ov stórt fyri tey.

Nú er kommunan sinnað at deila matr. nr. 1oe, soleiðis at tey kunnu keypa ein part av teimum 8.400 $m^2$, sum er upprunaliga støddin á stykkinum.

I. R Lastvognar hava í skrivi, dagfest 28. mars 2004, boðað frá, at um Tórshavnar havn er sinnað at keypa matr. 239 og 238a fyri kr. 3.241.043, so keypir felagið ídnaðarstykki á Sandvíkahjalla upp á umleið 3.000-4.000 $m^2$.

Ein kostnaðarmeting frá nov. 2003 metir, at virðið av matr. 239 og 238a við ástandandi húsum í Kollafirði er kr. 2.250.000.

**Havnanevndin 19. mai 2004:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Tórshavnar havn ynskti at keypa ognirnar fyri á tann hátt at kunna stýra virkseminum á havnaøkinum og fyri at hava møguleika at umskipa økið, um hetta gjørdist neyðugt.
Tórshavnar havn hevur eisini latið grannaognirnar hjá I. R. Lastvognum virðismett við møguligum keypi fyri eygað

Síðani samtyktina um at keypa ognirnar hjá I. R. Lastvognum í Kollafirði eru útlitini í búskapinum versnað og grannaognirnar eru seldar.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at keypa matr. 239 og 238a fyri metingarvirðið kr. 2.250.000 og at leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 21. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu, treytað av sølan er fingin í rættlag innan 1. august 2004.

**99/04** **<u>200100168</u>**

**<u>Berjabrekka – 3. byggistig - atkomuvegur</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at loyvi verður givið til bygging av 65 íbúðum norðan fyri Berjabrekku, verður neyðugt at gera atkomuveg frá vegamótinum Óluvugøta/Sundsvegur.

Mett verður at kostnaðurin fyri ein slíkan atkomuveg, sum er partur av ætlaða sambindingarvegi millum Sundsvegin og Villingardalsvegin liggur uml. kr. 10.000 pr. m, og longdin av vegateininum, ið talan er um at fara undir í sambandi við útstykkingarætlanina, er uml. 150 m.

Fyri at kommunan skal verða hildin útreiðsluneutral í byggibúningararbeiðinum, verður mælt til at partarnir, ið koma at nýta vegin, sjálvir rinda fyri arbeiðið at gera vegin. Partarnir eru sp/f Høgni Mikkelsen, Íbúðargrunnurin (Húsalánsgrunnurin v.fl.) og Tórshavnar kommuna (vegna serstovnin v/ Svenning á Lofti)

Sp/f Høgni Mikkelsen hevur í sambandi við byggioyvið rindað á kontogjald fyri sín part av atkomuvegnum, álj. kr. 500.000,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða kr. 1.000.000 til vegaarbeiðið, soleiðis at kommunan leggur út fyri hinar báðar partarnar.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2003:** Samtykt.

**Tekniska nevnd 6. mai 2004:** Nevndin samtykti at bjóða arbeiðið at gera atkomuvegin lidnan út í innbodna lisitatión at leggja fyri nevndina aftur.

Nevndin samtykti eisini at vegabreiddin verður 2 m gongubreyt + 7 m koyribreyt + 2 m gongubreyt uttan oyggjar og garðar.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur latið gera útbjóðingartilfar (j. nr 200100168/43) í sambandi við at arbeiðið skal bjóðast út, og lisitatión verður hildin 21. juni 2004 á teknisku deild. Býarverkfrøðingurin greiðir frá úrslitinum av lisitatiónini.

**Tekniska nevnd 22. juni 2004:** Meðan málið var til viðgerðar, luttók Høgni Mikkelsen ikki á fundi.

Nevndin samtykti at taka av tilboðnum hjá p/f Articon, álj. kr. 1.830.384,- u/mvg, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Býráðið 24. juni 2004:** Meðan málið var til viðgerðar, fór Høgni Mikkelsen av fundi.

Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:20**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jákup Suni Joensen | Høgni Mikkelsen |
| Bjarti Mohr | Schumann Hjaltalin | Sjúrður Olsen |
| Beate L. Samuelsen | Tórfinn Smith | Elin Lindenskov |
| Hildur Eyðunsdóttir | Jógvan Arge | Leivur Hansen |
| | Jógvan Thomsen | |
| | Jan Christiansen | |